gult20 cyan20 magenta20 svart20



# Tjaldrið upp á pláss aftur



**Starturin hjá Sílinum var so mikið vánaligur, at tað ongantíð kom upp á tal, at teir skuldu endurtaka sigurin frá í Fuglafirði**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*

**5–mannafør dreingir:** Tjaldursdreingirnir vórðu orduliga tiknir við nøsini, tá teir í Fuglafirði fyri fyrstu ferð, síðani báturin kom í fjør, ikki endaðu fremstir.

Í Hvalvík lótu teir ongan iva vera um sigurin. Tjaldrið stakk seg framum hinar í fyrstu tøkunum, og á málinum vóru teir eina lítla bátslongd frammanfyri Blik av Argjum.

Teir umborð á Bliki vóru sera knáir. Tá hálvur teinurin var rógvin, høvdu teir hug at bjóða Tjaldurs dreingjunum av, og tað kann væl vera, at teir eina lítla løtu vóru frammanfyri. Í hvussu so er var munurin ikki serliga stórur, men í startspurtinum var Tjaldrið drúgvast.

Tað kom ongantíð upp á tal, at nýggi báturin hjá Havnar Róðrarfelag, Sílið, skuldi endurtaka sigurin frá í Fuglafirði. Havnardreingir fingu ein sera vánaligan start. Stríðið hjá teimum galt um at fáa Fípuna Føgru aftur um seg, og tað eydnaðist. Men klaksvíksdreingirnir, sum allir royna seg fyri fyrstu ferð í ár, vístu enn eina ferð, at teir hava møguleika at gera um seg komandi árini.

# Páll Fangi lat seg ikki lumpa

**Jarnbardur hevði ein øgiligan start, men áðrenn teinurin var hálvrógvin, høvdu tær í Klaksvík víst, hvar skápið skuldi standa**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*

**6–mannafør kvinnur:** Í níti árunum og til og við í fjør vann Jarnbardur seks FM heiti. Í ár hava havnakvinnurnar staðið í skugganum á teimum umborð á Páll Fanga.

Leygardagin tóktist tað eina løtu sum um, at nú vildu tær umborð á Jarnbardi sleppa úr aftur skugganum. Jarnbardur hevði ein framúr góðan start. Tær lupu eina hálva bátslongd framum, og tær vóru næstan leysar, áðrenn tær umborð á Páll Fanga so at siga høvdu stabiliserað seg, hildu tørn og so spakuliga fóru at taka tað, tær høvdu mist aftur.

Tá einir trý hundrað metrar vóra lagdir afturum gekk skjótt hjá Páll Fanga. Á einum tvey hundrað metrum megnaðu tær at vinna tvær bátslongdir soleiðis at skilja, at tær í staðin fyri at vera eina bátslongd aftanfyri vórðu eina bátslongd frammanfyri Jarnbard.

Á málinum var Páll Fangi leysur av Jarnbardi, sum aftur var leysur av Sølmundi og Gongurólvi, ið kappaðust øgiligt um triðja plássið. Ta kappingina vunnu tær í róðrarfelagnum NSÍ, men munurin var sera lítil.

Eingin ivi tykist vera um, at Páll Fangi fer at vinna FM. Tað tykist eisini sannlíkt, at tær fara at vinna allar róðrarnar. Um nakar skal hótta tær, so verður tað Jarnbardur. Spurningurin er, um tær megna at venja treystleikan so mikið, at tær í Sørvági og kanska serliga á ólavsøku fara at megna at geva teimum í Klaksvík ta kappingina, sum tær higartil ikki hava fingið. Men tað fer neyvan at endurtaka seg fleiri ferðir, at Páll Fangi fer at geva so nógv frá sær í startinum.







# Mest spennandi kappingin



**Tríggir bátar skiftust um at vera fremstir, og enn eina ferð megnaðu strandingarnir at vera drúgvastir**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*

**6–mannafør menn:** Í fleiri kappingum kann tað kennast ikki so ógvuliga áhugavert, tá ein og sami bátur vinnur allar róðrarnar og ongantíð í nøkrum róðri fær kapping frá nøkrum øðrum báti.

Soleiðis er tað avgjørt ikki, tá 6–mannaførini við monnum kappast. Í Hvalvík vann Strálan av Strondum fyri triðju ferð. Munurin aftur til Sølmund og Riddaran var ein knøpp bátslongd, men kappingin var sera spennandi.

Hvessingur var í heimasjógvi. Í níti árunum vann hann FM heitið fimm ferðir. Í ár hevur ikki hilnast væl hjá teimum, men í startinum í Hvalvík tóktust teir ætla sær at vera við, har tað gekk fyri seg. Hetta eydnaðist kortini ikki heilt. Á fjórða plássinum var Hvessingur gott og væl eina bátslongd aftanfyri Riddaran. Páll Fangi, sum bara var ein lítlan skut aftanfyri Hvessing á málinum, tvífaldaði sítt stigatal – úr tveimum og upp í fýra.

Strálan fekk ikki so góðan start, sum bæði Riddarin og Sølmundur fingu, men kortini var tað skjótt, at Strálan var við, har tað gekk fyri seg. Tá hálvt málið var rógvið, var Strálan eina hálva bátslongd undan hinum, men eftir tað var munurin onkuntíð minni enn so.

Hóast kappingin ikki er púra avgjørd, so bendir nógv á, at tað verður Strálan, sum fer at vinna FM og harvið endurtaka sigurin frá í fjør. Men tað verður sera spennandi at síggja, hvussu tað fer at tørna út í teimum báðu síðstu kappingunum. Ikki minst ólavsøkuróðurin kann hugsast at gerast rættuliga spennandi.

# Teir á Nevinum Reyða róðu við Kvívíkinginum á rygginum

**Hóast munurin ikki var meiri enn ein bátslongd, so tóktist sigurin hjá klaksvíkingum sannførandi**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*



**8–mannafør:** Tað var spenningur um, hvussu nú fór at vera hjá kvívíkingum og klaksvíkingum. Í Fuglafirði høvdu kvívíkingar so at siga tikið fremsta plássið frá Nevinum Reyða.

Í Hvalvík vóru nógvir klaksvíkingar at síggja. Tað tóktist næstan sum um, at teir nú vildu fáa sigurin burturúr útferðini, sum teir ikki fingu fríggjakvøldið, tá KÍ var í Gøtu.

Og teir umborð á Nevinum Reyða lótu ongan iva vera um, hvør fór at vinna. Á fyrstu metrunum í startspurtinum tóku teir ein stóran skut frá hinum bátunum. Teir øktu spakuliga, onkra løtuna vóru teir leysir, men fyri tað mesta høvdu Kvívíkingur og Knørrur um róðrið og onkuntíð reiðiliga tað á Nevinum Reyða, og Argjabáturin var heldur ikki sørur.

Í Hvalvík ljóðaði tað, at klaksvíkingar á ein serstakan hátt høvdu sett hvønn annan upp at vinna á Kvívíkingi, og Martin Venned greiðir soleiðis frá:

– Á heimasíðuni hjá okkum er ein mynd, sum vísir, hvussu lítil munurin á varmakeldustevnu var frá Kvívíkingi og til okkara. Har er bara stavnurin ímillum. Vit høvdu printað myndina út og allir høvdu hana á rygginum, meðan vit róðu. Vit vóru samdir um, at vit skuldu gera alt, sum tað bar okkum til at gera, fyri at úrslitið í Fuglafirði ikki skuldi endurtaka seg, og tíbetur eydnaðist tað, sigur Martin Venned, sum er ein av veteranunum umborð á Nevinum Reyða.

Tá teir umborð á kvívíkingi takkaðu klaksvíkingum fyri róðurin, fingu teir eina mynd frá teimum umborð á Nevinum Reyða, sum vísti, hvussu tað sá út, tá Kvívíkingur vann í Fuglafirði.

Hví vunnu tit ikki í Fuglafirði?

– Fyrst og fremst komst tað av, at teir umborð á Kvívíkingi róðu stak væl. Sjálvandi hava vit eftirmett okkara avrik ta ferðina. Lotið var ímóti, og vit skuldu ikki havt róð so seigan ta ferðina. Ferðin á bátinum gjørdist ongantíð nóg góð. Hetta var ikki nakar trupulleiki í Hvalvík, tí har var lotið undan nokk so fitt, staðfestir Martin Venned.